Føroya Pedagogfelag Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið 1. mars 2001 til 1. okt. 2003

**Semja millum Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálastýrið, Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin um sáttmálasettar pedagogar og hjálparfólk**

Sáttmálarnir verða endurnýggjaður fyri tíðina 1. mars 2001 til 1. oktober 2003 við hesum broytingum.

**Løn og flokking.**

1. mars 2001 verður latin ein ikki eftirlønargevandi viðbót á 908 kr. um mánaðin.
1. mars 2002 verður farið yvir til hjálagdu lønartalvu og samstundis vera eisini hesar flokkingar galdandi:

Sí hjáløgdu lønartalvur og yvirflytingarskjal á 10 síður.

Varaleiðarar uttan útbúgving fáa skalagongd:

- 0 - 119 stig vera lønarstigini 2, 3, 4, 5, 6
- 120 -174 stig vera lønarstigini 3, 4, 5, 6, 7
- 175 - stig vera lønarstigini 4, 5, 6, 7, 8

Pedagogar, ið starvast innan heilsuverkið, fylgja lønarásetingini fyri pedagogar á bústovnaøkinum.
Stuðulspedagogar verða løntir sum pedagogar á bústovnum.
Hjálparfólk, ið sita í stuðulspedagogstørvum, verða lønt sum hjálparfólk á bústovnum.
Dagrøktarleiðarin í Tórshavnar kommunu verður løntur á stigi 35.
Pedagogogiskur ráðgevi í barnaforsorgarmálum hevur skalagondina 14, 15, 17, 19, 21 og 22.
Talipedagogurin innan fólkaskúlan verður løntur á stigi 21.
Pedagogurin á Sernámsdeplinum verður løntur á stigi 21.

Leiðarar á serstovnum hava skalagongdina:

0 - 15 stig 22, 24, 26
15.01 - 25.00 stig 23, 25, 27
25.01 - stig 25, 27, 29

Dagrøktarleiðarastørv verða flokkað eftir stigatalsskipanini, sum verður roknað eftir barnatalinum soleiðis:

- hvørt barn undir 3 ár telur 2 stig
- hvørt barn yvir 3 ár telur 1 stig

Hesar lønarhækkingar og flokkingar byggja á ein karm sum er:

- 1. mars 2001: 5%
- 1. mars 2002: 4%
- 1. mars 2003: 3%

Partarnir vita, at trupulleikar kunnu vera, tá ið lønartalvan verður skift, og tí ber til at avtala øðrvísi terminir fyri lønarhækkingarnar, um hetta kann gerast útreiðsluneutralt.

**Eftirløn.**

*Sáttmálasettir pedagogar:*

Uttan at gera broytingar í ognarrætti, hava partarnir av praktiskum ávum avtalað at avtaka skipanina við 4% og 8%, og í staðin rindar arbeiðsgevarin 12% av nettolønini frá 1. mars 2002.

**Avtala um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu.**

Tað er týðandi, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit til sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfókapolitikk á hesum økjum:

- Førleikamenning
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins/kommunalum stovnum
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins/kommunalum stovnum
- Javnstøða

Víst verður til hjáløgdu avtalu um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum. Sí viðlagda skjal.

**Annað**

Har "Føroya Landsstýri" stendur í sáttmálum og avtalum sum sáttmálapartur, verður hetta broytt til "Fíggjarmálastýrið/avvarðandi kommunala arbeiðsgevarafelag".

Sáttmálanir verða dagførdir samsvarandi hesi semju, og miða partarnir ímóti, at hetta verður liðugt innan 1. mars 2002.

Henda semja er galdandi frá 1. mars 2001 og kann av pørtunum sigast upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober 2003.

Samstundis sum henda semja verður undirskrivað, verður váttað, at Fíggjarmálastýrið og kommunalu arbeiðsgevarafeløgini beinanvegin fara at heita á lønarútgjaldingarstøðini um at útgjalda lønarreguleringina saman við lønini í desember.

Dagfesting: 6. desember 2001

**Føroya Pedagogfelag**

Carita Bjørklund Ann E. Joensen Bjørghild í Geil
Marita Ejdesgaard Elsa Klein Olsen

**Fíggjarmálastýrið**

Karsten Hansen Thomas Magnussen

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Jan Christiansen Rodmundur Nielsen

**Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag**

Sunniva Kollslíð Gunn Joensen Jónhild Jørgensen

Fíggjarmálará